LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

**Løgtingið**

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 120/2022 eftir tingskipanini § 52a til Aksel V. Johannesen, løgmann, frá Jenis av Rana, løgtingsmanni, um luttøku á NATO-fundum**

**Spurningar:**

1. Hvussu langt eru ætlanirnar komnar um at senda "ein føroyskan ministara", sum løgmaður málber seg í útvarpinum, saman við danska uttanríkisráðharranum á NATO-fundir?
2. Verður tað landsstýrismaðurin í uttanríkismálum, sum fer saman við danska ministaranum á hesar fundir?
3. Metir løgmaður ikki, at hesar kreativu ætlanirnar, at javnseta "ein føroyskan ministara" við donsk embætisfólk, mugu leggjast fyri Uttanlandsnevndina til ráðførslu og/ ella fyri Løgtingið?

**Svar til spurning 1:**
Landsstýrið hevur í fleiri umførum sett fram ynski um at taka lut á viðkomandi NATO fundum, tá ið mál og viðurskifti, sum eru viðkomandi fyri Føroyar, eru á skrá. Seinast hetta varð ført fram var á samstarvsráðsfundinum í Nuuk herfyri. Í samsvari við, at NATO í størri mun enn fyrr hevur strategiskt fokus á Norðurhøv, hevur tað týdning, at Føroyar taka virknan lut í teimum tilgongdum, ætlanum og avgerðum, sum kunnu ávirka trygdar- og verjupolitisku gongdina um okkara leiðir. Vónandi bera ætlanirnar hjá landsstýrinum á mál innan ikki alt ov rúma tíð.

**Svar til spurning 2:**
Tað valdast, hvat fyri slag av fundi, talan er um. Á NATO toppfundum luttaka vanliga stjórnarleiðarar. Eisini eru aðrir fundir, har ávikavist uttanríkisráðharrar og verjumálaráðharrar hittast. Til hetta slag av fundum verða tað ávikavist løgmaður og landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum, sum taka lut og umboða Føroyar.

**Svar spurning 3:**
Spurningurin um ein møgulig føroysk luttøka á NATO-fundum krevur ráðførslu við Uttanlandsnevndina er ikki umrøddur. Hetta kemst av, at ítøkiliga málið um føroyska luttøku, ikki er liðugt viðgjørt enn.

Í Tinganesi, 23. juni 2023

Aksel V. Johannesen
løgmaður

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – e-mail: info@tinganes.fo - www.lms.fo